UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingsins vinnunevnd

Tórshavn, 21. apríl 2023
J.nr.: 23/06898
Viðgjørt: jd

Viðv. løgtingsmáli nr. 095/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum

Í § 4 í løgtingslóg um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum er ásett, at afturbering av útreiðslum verður bert veitt føroyskum partafelag ella smápartafelag, sum er stovnað til ta ítøkiligu framleiðsluna, sum afturberingin viðvíkur.

Krav um, at partafelag ella smápartafelag skal setast á stovn til ta ítøkiligu framleiðsluna, er grundað á, at tað var hildið neyðugt at hava eftirlit við, at stuðul ikki varð veittur av órøttum, og at tað var lættari at tryggja eftirlit og grannskoðan, um hvør einstøk framleiðsla var framd í einum felag, sum var stovnað til endamálið.

Eftir at omanfyrinevnda lógaruppskot var borið Løgtinginum, hava Filmshúsið, TAKS og grannskoðarar gjørt Uttanríkis- og vinnumálaráðið varugt við, at krav um, at eitt felag skal stovnast til hvørja verkætlan, er óneyðugt og tungt at fáast við.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur mett um málið og er komið til ta niðurstøðu, at ein verkætlanarroknskapur fyri ta ítøkiligu framleiðsluna røkkur sama endamáli um eftirlit og grannskoðan, og at krav um eitt nýtt felag til hvørja framleiðslu tí eigur at verða strikað.

Mælt verður tískil Løgtings vinnunevnd at leggja fram soljóðandi broytingaruppskot:

§ 4, stk. 2, verður orðað soleiðis:

"Stk. 2. Felagið hevur ábyrgdina av, at framleiðslan verður framd í Føroyum, og at gjørdur verður ein verkætlanarroknskapur fyri nevndu framleiðslu, sum vísir allar útreiðslurnar, sum afturberingin viðvíkur. Útreiðslurnar, sum afturberingin viðvíkur, skulu bókast í felagnum."

Vinarliga

Høgni Hoydal
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen